# ítróttur

Nr. 26 • fríggjadagur • 7. februar 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Bridge-úrslit




*Saman við liðnum hjá Allan Dal-Christiansen eru Junior Buss Taxa klárt fremstir í bestu deildini*

## Hetta vikuskifti hevur verið spælt nógv bridge í Bridgehúsinum í Havn

BRIDGE
*Bogi Simonsen*

Leygardagin var hálvfinalan fyri pør leikt. 35 pør leiktu við, og kappingin varð spæld sum ein Mitchel kapping, har norður/suður sita fast.

### Úrslit frá leygardegnum:

***FM pør semifinala***

Leikt í Bridgehúsinum í Havn leygardagin 1. feb. 2003.

| Nr | NS | Stig |
|---|---|---|
| **1** | **Bogi Simonsen** | |
| | **Rói á R. Joensen** | **143** |
| **2** | **Carl Mikkelsen** | |
| | **Egil Helmsdal** | **136** |
| **3** | **Magni Jøkladal** | |
| | **Robert Langgaard** | **104** |
| **4** | **Oddmar Danielsen** | |
| | **Einar Ellingsgaard** | **92** |
| **5** | **Jákup Hjaltalin** | |
| | **Fríðhild Petersen** | **71** |
| **6** | **Petur Annfinn Johannesen** | |
| | **Eilif Petersen** | **63** |
| **7** | **Atli Hansen** | |
| | **Jógvan Ranghamar** | **58** |
| **8** | **Eyðun Jakobsen** | |
| | **Jana Mikkelsen** | **18** |
| **9** | **Per Kallsberg** | |
| | **Dánjal Pauli Mohr** | **8** |
| **10** | **Eyðun Jensen** | |
| | **Niels Nielsen** | **0** |
| 11 | Øssur Winthereig | |
| | Pól Joensen | -7 |
| 12 | Danny Danielsen | |
| | Tórheðin Thomsen | -13 |
| 13 | Jaspur Langgaard | |
| | John Reid Skoralíð | -45 |
| 14 | Allan Dal-Christiansen | |
| | Høgni Hansen | -57 |
| 15 | Haldor Ellingsgaard | |
| | Eyðun S. Olsen | -95 |
| 16 | Mogens Højsted | |
| | Finn B. Dam | -119 |
| 17 | Ásla Weihe | |
| | Hallgerð Hansen | -153 |
| 18 | Marjun Isaksen | |
| | Katrin Rasmussen | -196 |

| Nr | EV | Stig |
|---|---|---|
| **1** | **Árni Dam** | |
| | **Marner Joensen** | **153** |
| **2** | **Salomon Johansen** | |
| | **Zakaris Joensen** | **117** |
| **3** | **Símin Lassaberg** | |
| | **Eyðun Anthoniussen** | **112** |
| **4** | **Heðin Mouritsen** | |
| | **Jóannes Mouritsen** | **91** |
| **5** | **Henriette Svenstrup** | |
| | **Jóna Grunnveit** | **77** |
| **6** | **Edmund Joensen** | |
| | **Dia Petersen** | **71** |
| **7** | **Arnbjørn Sivertsen** | |
| | **Hans J. Petersen** | **58** |
| **8** | **Hallberg Arnfríðsson** | |
| | **Kaj Alstrup** | **54** |
| **9** | **Helgi Joensen** | |
| | **Eyðun Joensen** | **51** |
| 10 | Bjarki Johannesen | |
| | Jenis Tummasarson | -22 |
| 11 | Maria Christiansen | |
| | Laila Danielsen | -34 |
| 12 | Dia Jacobsen | |
| | Ólavur Larsen | -54 |
| 13 | Gunnar Mouritsen | |
| | Høgni Vesturklett | -95 |
| 14 | Finnbogi Hansen | |
| | Poul Erik Jensen | -97 |
| 15 | Høgni Jacobsen | |
| | Finn Ougaard | -103 |
| 16 | Hanus Bærentsen | |
| | Eyðbjartur Danielsen | -140 |
| 17 | John Erik Fredriksberg | |
| | Finn Jacobsen | -231 |

Víðari í finaluna komu pørini, sum eru skrivað við feitari skrift.

Finalan verður leikt í Bridgehúsinum í Havn leygardagin 5. apríl frá kl 10.00.

Sunnudagin varð eitt umfar í liðkappingini hjá 1 og 2 deild leikt. Nógv gott og spennandi bridge var á skránni.

### Úrslitini vóru:

**1.deild**

| | |
|---|---|
| Junior Buss Taxa | |
| Carl Mikkelsen | 24-06 |
| Jóna Grunnveit | |
| Allan D. Christiansen | 10-20 |
| Jórun Johannesen | |
| Símin Lassaberg | 13-17 |

**2.deild**

| | |
|---|---|
| Dia Jacobsen | |
| Petur Winther | 12-18 |
| Danny Transport | |
| Marita Krossteig | 21-09 |
| Jens Pauli G. Nolsøe | |
| Hallur Ellingsgaard | 20-10 |
| Odd Fjallsbak | |
| Eyðun S. Olsen | 07-23 |

**Støðan í 1. deild**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Allan Dal-Christiansen | 141 |
| 2 | Junior Buss Taxa | 141 |
| 3 | Carl Mikkelsen | 88 |
| 4 | Jóna Grunnveit | 87 |
| 5 | Jórun Johannesen | 86 |
| 6 | Símin Lassaberg | 77 |

**Støðan í 2. deild**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Petur Winther* | 143 |
| 2 | Hallur Ellingsgaard | 135 |
| 3 | Jens P. G. Nolsøe* | 133 |
| 4 | Marita Krosstein | 125 |
| 5 | Danny Transport | 100 |
| 6 | Eyðun S. Olsen | 91 |
| 7 | Dia Jacobsen | 67 |
| 8 | Odd Fjallsbak | 54 |

*Hesi liðini hava leikt ein dyst meir enn hini.

# Mótstøðuliðini greið

**Oyggjaleikanevndin hevur nú kastað lut um, hvussu bólkarnir í flogbóltskappingini verða**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Flogbóltur er vanliga ein av ítróttagreinunum, har Føroyar standa seg hampuliga væl á Oyggjaleikunum. Tí munnu vónirnar um heiðursmerki aftur vera sterkar í ár, og longu nú kunnu Føroyar so smátt fara at fyrireika seg til mótstøðuliðini.

Bólkarnir í kappingini eru nevnliga longu settir saman, og við styrkismetingini er greitt, at kvinnurnar sluppu undan at spæla móti Saaremaa, sum annars hevur verið millum argastu mótstøðuliðini.

Yvir høvur tykist lutakastið hjá kvinnunum eisini at vera hampuliga gott. Hóast fleiri av londunum hava gjørt stór framstig seinnu árini, so bendir alt á, at Føroyar uttan stórvegis trupulleikar eiga at koma víðari úr bólkinum.

## Hart hjá monnunum

Hjá monnunum var lutakastið ikki heilt so gott, sum hjá kvinnunum. Menninir eru ikki toppseedaðir, og tí var greitt, at í øllum førum eitt av mótstøðuliðunum fór at vera í tí heilt sterka flokkinum, og gjørdist tað her Áland. Men eisini onkur av hinum londunum kunnu vísa seg at gerast ein stórur biti.

Eitt nú Cayman Oyggjarnar, sum hava gjørt sera stór framstig seinnu árini, og sum eisini góvu føroyingunum trupulleikar í fyrraárið. Og heldur ikki skulu grønlendingar gloymast í hesum sambandinum.

Bókarnir til Oyl síggja annars soleiðis út:

**Menn**
**Bólkur A**
Áland
Føroyar
Cayman
Jersey
Grønland
Froya

**Bólkur B**
Gotland
Saaremaa
Rhodos
Guernsey
Bermuda
Gibraltar

***Kvinnur***
***Bólkur A***
Føroyar
Gibraltar
Cayman
Grønland
Hitra

**Bólkur B**
Saaremaa
Guernsey
Jersey
Áland
Bermuda



# Almennar flogferðir

**Fíggjarmálaráðið hevur gjørt royndaravtalu við seks ferðamannastovur um keyp av flogferðaseðlum til almenn starvsfólk**

SAMFERÐSLA

Tær almennu uttanlandsferðirnar skulu fáast so bíligar sum gjørligt. Tað vil siga, at Fíggjarmálaráðið vil hava allar fyrimunir, sum fáast kunnu burtur úr flogferðunum, í sín part.

Ein royndarskipan er gjørd, har avtalað er við seks føroyskar feðramannastovur um keyp av flogferðaseðlum. Ferðamannastovurnar skulu so syrgja fyri, at teir fyrimunir, sum eru, kunnu fáast. Aftur fyri fær ferðamannastovan 50,- krónur av hvørjum feðraseðli í sín part. Bert skal viðmerkjast, at talan er um ferðaseðil, sum landskassin rindar fyri.

Í tíðindaskrivi sigur Fíggjarmálaráðið, at stovnarnir eiga at ferðast á bíligasta hátt. Tí er hendan royndarskipanin gjørd, og skal hon ætlandi vara í tríggjar mánaðar.

Við tíðindaskrivinum eru løgd yvirlit yvir tey tilboð, flogfeløgini hava, har víst verður á teir møguleikar, fyrimunuir og treytir, sum liggja við slíkari ferðing.

Tær seks ferðamannastovurnar, sum eru við í royndarskipanini eru Atlantsflog, Faroe Travel, Flogfelag Føroya, Fonn Flog, MB-Tours og Smyril Line.

**ej**



# Ganga vit á fjøllum

**Gongubólkurin hjá Felagnum Tórshavn hevur sett sær sum má, at ganga eftir øllum kommunumarkinum hjá Tórshavnar Kommunu í hesum árinum. Fyrsti túrurin hevur verið**

GONGUFERÐ



At ganga eftir kommunumarkinum hjá Tórshavnar Kommunu er ein størri fyritøka, sum ikki verður gjørd eftir einum degi. Tí er gjørt av at býta setningin sundur í fleiri túrar, sigur Felagið Tórshavn í tíðindaskrivi um dagarnar.

Fyribils er ætlanin at gera átta túrar eftir markinum, siga tey. Tann fyrsti túrurin er longu gjørdur. Hann varð gjørdur í keðiligum veðri tann 19. januar, og gingið varð stuttan tein av Sundshálsi oman í Havnardal til Sandá, har Tvørá rennur út, og mark er til Kirkjubøar Kommunu.

Kunningarstovan í Havn sigur í tíðindaskrivinum, at neyðugt er við tilmelding til túrarnar. Ikki tí, at luttøkan verður avmarkað, men tí at neyðugt verður við felags flutningi. Eisini til teir stytstu og lættastu túrarnar. Tilmeldingin verður gjørd á Kunningarstovuni í Havn, og túrarnir verða hvør sær lýstir í Havnartíðindi, sigur Kunningarstovan í tíðindaskrivinum.

Havnar Kommuna hevur mark við Kirkjubør Kommunu, Kvívíkar Kommunu, Hvalvíkar Kommunu og Hósvíkar Kommunu. Samlaði teinurin fram við markinum hjá Tórshavnar Kommunu er 40 kilometrar til longdar.

**ej**


Hava tygum tørv á einum bili í nakrar tímar, dagar ella longur, er skilagott at leiga, heldur enn eiga!
Setið tygum í samband við okkum,
- tað loysir seg!!

AVIS BILÚTLEIGAN

Staravegur 1, Tórshavn, tlf. 217 535 / 313 535
Flogvøllurin: tlf. 212 765 /358 800
Teldupostur: avis@post.olivant.fo






Okkara deildarleiðari í nógv ár, Tummas M. Jacobsen, hevur avgjørt at taka við nýggjum avbjóðingum í Sparikassanum. Jónleif Th. Jacobsen er settur sum nýggjur deildarleiðari og Kristine Ellingsgaard sum varaleiðari fyri deildirnar í Eysturoy.

Í hesum sambandi hava vit móttøku fríggjadagin 7. februar kl. 15 – 17 á deildini í Runavík, har viðskiftafólk hava høvi at heilsa uppá Tummas, Jónleif og Kristine. Sparikassin bjóðar øllum hjartaliga vælkomnum inn á gólvið.

FØROYA SPARIKASSI
www.sparikassin.fo